# ARGJA SKÚLI

Argjavegur 32 · FO-165 Argir · Postboks 2002

Tel 30 25 10 · Fax: 30 25 11 · argskuli@post.olivant.fo

## Lærarastørv í Argja skúla

### Hesi størv verða lýst leys at seta frá 1. august 2007:

- 9 tíðaravmarkaði størv fyri lærarar í farloyvi
- 2 lærarar í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/2008 vegna lækkað tímatal, serligan tørv og avlopstímar.
- 1 starv fyri lærara í burðarfarloyvi frá 1. august 2007 - 1. januar 2008

**Søkt verður eftir lærarum sum**
duga at samstarva, eru fyrikomandi, sýna næmingum og undirvísing sín eldhuga og hava áræði til at taka ábyrgd

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum

- Føroyskum
- Kristni
- Handverk og list
- Støddfrøði
- Alisfrøði
- Náttúru og tøkni
- Fimleiki /svimjing ge/dr
- Serligum tørvi

**Lønar- og setanartreytir:**
Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so er, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan. Størvini eru lønt í lønarflokki 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

Tímatalið til *eitt* av tíðaravmarkaðu lærarastørvunum verður ikki endaliga ásett fyrr enn 1. september 2006.

**Umsóknir**
Umsóknir við lívsrensli og avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu vera skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi 20. juni**

Nærri kunning um størvini fæst við at ringja til **Marjun Holm**, skúlastjóra, á tlf 302510 og 221466 ella **Símun Abrahamsen**, varaskúlastjóra á tlf. 302510 og 221100.

Eisini ber til at senda teldupost til skúlan argskuli@post.olivant.fo

**Argja skúli** hevur komandi skúlaár 333 næmingar í 1 . - 10. flokki, tveir flokkar í hvørjum árgangi. Á skúlanum starvast 33 lærarar, 1 skrivstovufólk, 2 húsavørðar og 6 vaskifólk. Argja skúli arbeiðir í løtuni við at styrkja samstarv millum heim og skúla og fyri fjølbroyttari, avbjóðandi og mennandi undirvísingini. Og somuleiðis fyri góðum arbeiðsumhvørvi hjá øllum, sum virka í Argja skúla. Skúlin stendur fyri stórari, spennandi útbygging uppi á Hamrinum. Les meir um okkum á www.argjaskuli.fo

FAROE SEAFOOD




### P/F Faroe Seafood søkir eftir starvsfólk til søludeildina

P/F Faroe Seafood eigur 8 fiskavirkir og eru hesi spjødd um alt landið.

Felagið hevur drúgvar royndir við at hagreiða og selja øll fiskasløg, serliga upsa, tosk, hýsu, svartkalva og kongafisk. Vit selja og útflyta vørur til nógv ymisk lond.

**Uppgávurnar hjá starvsfólkinum verður m.a:**

- logistikk
- samstarv og samskifti við keyparar av vørunum.
- samstarv og samskifti við flutningsfeløg
- samstarv og samskifti við keypsleiðslu
- samstarv og samskifti við søluleiðslu og virkisleiðarnar

**Krav er at umsøkjarin hevur hesar førleikar:**

- góðan málkunnleika serliga í enskum
- Studentsprógv ella HHprógv
- góð samstarvs- og kommunikatiónsevni.

**Ynskiligt, tó ikki treyt, er at umsøkjarin hevur hesar førleikar:**

- kunnleika til Axapta ella Navision
- kunnleika til og royndir innan logistikk.
- kunnleika til framleiðslu á fiskavirkjum.

Upplæring verður givin.

Studenta- og handilsskúlanæmingar sum verða liðug í summar eri eisini vælkomin at søkja.

Starvsstaður er á skrivstovu okkara í Havn.

Løn eftir avtalu.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknarfreistin er 11. juni 2007. Um fyrispurningar eru viðvíkjandi hesum starvi, so kunna tygum tosa við Símun Jacobsen, sølu- og framleiðslustjóri.

Umsóknin skal saman við prógvum og viðmælum sendast áðrenn 11. juni 2007 til:

**Faroe Seafood P/F**
att : Símun Jacobsen
Postboks 68 · FO-110 Tórshavn, Føroyar
Telefon 355555 · Telefax 355550

P/F Faroe Seafood P/F · Vestara Bryggja · FO-100 Tórshavn · Tlf. 355555

FØROYA HANDILSSKÚLI

TEAM85

## Kunningarfundur um MBA og HD

Ynskir tú framhaldandi útbúgving innan leiðslu? Ella á HD? **Hósdagin 7. juni kl. 19.00** verður á Føroya Handilsskúla **kunningarfundur um MBA Fleksibel og HD linjur**, sum vera bodnar út á Handilsháskúlanum í Århus. Umboð fyri Handilsháskúlan, m.a. John Ibsen Kjeldsen, lektor og lestrarleiðari fyri HD og MBA útbúgvingarnar, fara at greiða frá møguleikunum við Handilsháskúlan í Århus.

Vinarliga **boða frá luttøku í seinasta lagið mikudagin kl. 12.00** á skrivstovu Handilsskúlans ella við at senda teldupost til **sg@hsh.fo**

**FØROYA HANDILSSKÚLI**
Postsmoga 177 · 110 Tórshavn · Tel 317177 · Telefax 313374 · www.fh.fo



## HANDILSBYGNINGURIN HJÁ FRÓÐA TIL SØLU!

Talan er um handilsbygning, sum liggur Yviri við Strond 3, 100 Tórshavn. Bygningurin er í 3 hæddum. Samlaða gólvvíddin er umleið 730 m². Grundøkið er umleið 550 m². Tað er betongdekk millum hæddirnar.

Bygningurin kann t.d. nýtast til skrivstovuhølir og handil.

Bygningurin liggur sera væl fyri og hevur gott útsýni yvir Eystaru Bryggju og Nólsoyarfjørð.

Ognin verður seld um hóskandi boð fæst. Ognin kann síggjast eftir avtalu. Meiri fæst at vita um ognina við at fara inn á heimasíðu okkara www.lawfirm.fo

Áhugaði kunnu venda sær til Inga Højgaard, advokat, fartelefon 511709 og ih@lawfirm.fo

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS · LAWFIRM@LAWFIRM.FO
**HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO**

TÓRMÓÐUR DJURHUUS · JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS · JÓGVAN E. ELLEFSEN
ANNA DAM · INGI HØJGAARD · JÓHAN J. LAMHAUGE GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

Lesið Sosialin -so eru tit við!